gult cyan magenta svart



# Eldur festi í navrarnar

ELDUR
*Eirikur Lindenskov*

Seinnapartin mikudagin kom eldur í tekjuna í húsunum á Tinghúsvegi 4 í Havn. Handverkarar vóru í ferð við at skifta tak og brendu tjørupapp á nýggja tróðrið, tá eldur kom í millum skins og hold.

Sløkkiliðið varð boðsent, men tað gekst heldur truppult at basa eldinum, sum breiddi seg undir nýggja tróðrinum.

Talan er um gomul hús, sum Anton Degn, skjalavørður í sínari tíð átti. Húsini hava havt flagtekju, og tískil vórðu tey takt við nævur, sum fyrr varð nýtt undir flagnum.

Eldurin festi í nævrarnar, og tí var hann heldur trupul at basa, sigur Petur Seloy, sløkkiliðsmeistari.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at húsini fingu kortini ikki stóran skaða, hóast partur av tróðrinum fórst. Nakað av vatn- og roykskaða var eisini.




Petur Seloy sigur, at teir nýliga hava fingið framkomna útgerð, sum teir í hesum føri settu inn í íbúðina til tess at taka sum mest av roykluktinum.

## Tryggingar stuðla sløkkiliði

BJARGING

Saman við tryggingarfeløgunum keypir Tórshavnar Sløkkilið nýtt tól, sum kann bjarga mannalívum.

Tólið kallast Fire Flair, og tað kann mála hitamunir og gevur sløkkiliðsmanninum eina neyva litmynd av ríminum, og kann hann soleiðis síggja fólk, sum er í rúmi, hóast svart er í royki.

Tólið vísir eisini, um t.d. eldur er inni undir einum taki ella aftan fyri ein vegg, og hetta ger tað lættari hjá sløkkiliðnum miðvíst at basa eldi uttan at gera óneyðugan skaða, somuleiðis sum vissa kann fáast fyri, at eldurin er sløktur.

Hetta hevur sjálvandi áhuga hjá tryggingarfeløgunum báðum, tí hetta er við til at avmarka skaðan, sum feløgini skulu endurrinda.

Tryggingarfeløgini koma eisini ofta út fyri, at rør, sum í húsum liggja fjald millum skins og hold og undir vaðingum, leka og kunnu elva til stórar og dýrar skaðar. Í tílíkum førum verður tólið til stóra hjálp, tí tólið finnur ikki bara fram til lekan frá fjalda rørinum, mein vísi reisini, hvar lekin er. Tá ber til at umvæla skaðan uttan at bróta óneyðugt niður innan í húsum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið kanska kavaælingur. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og okkurt kavaælið fyrrapartin, annars sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og vátakavi ella regn av og á. Hitin millum 1 og 5 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 4 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | ÷3 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1005 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga eystureftir.




Lágtrýstið yvir Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum leygarmorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/03 kl. 06⁰⁰–22/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷0,0°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 21/03 kl. 06⁰⁰–22/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 40,1 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

16. mars: Seinna kvarter
20. mars: Mánin longst frá jørðini
25. mars: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 23. mar | 05.39 | 17.59 | 04.39 | 16.59 | 04.54 | 17.14 | 07.39 | 19.59 | 08.39 | 20.59 | 03.54 | 16.14 | 02.54 | 15.14 | 05.54 | 18.14 | 06.54 | 19.14 | 05.24 | 17.44 | 06.39 | 18.59 |
| 24. mar | 06.18 | 18.37 | 05.18 | 17.37 | 05.33 | 17.52 | 08.18 | 20.37 | 09.18 | 21.37 | 04.33 | 16.52 | 03.33 | 15.52 | 06.33 | 18.52 | 07.33 | 19.52 | 06.03 | 18.22 | 07.18 | 19.37 |
| 25. mar | 07.56 | 20.15 | 06.56 | 19.15 | 07.11 | 19.30 | 09.56 | 22.15 | 10.56 | 23.15 | 06.11 | 18.30 | 05.11 | 17.30 | 08.11 | 20.30 | 09.11 | 21.30 | 07.41 | 20.00 | 08.56 | 21.15 |
| 26. mar | 08.34 | 20.53 | 07.34 | 19.53 | 07.49 | 20.08 | 10.34 | 22.53 | 11.34 | 23.53 | 06.49 | 19.08 | 05.49 | 18.08 | 08.49 | 21.08 | 09.49 | 22.08 | 08.19 | 20.38 | 09.34 | 21.53 |